# LEIÐARAPROFILUR

## Fíggjarleiðari til Vága kommunu

## Apríl 2024

**INNIHALD**

INNGANGUR ..... 3

UM VÁGA KOMMUNU ..... 3

STARVIÐ SUM FÍGGJARLEIÐARI ..... 4

FØRLEIKAKRØV TIL FÍGGJARLEIÐARAN ..... 5

LØN OG SETAN ..... 6

UMSÓKN OG UPPLÝSINGAR ..... 6

SETANARTILGONGDIN ..... 6

TÁ STARVIÐ ER SETT ..... 6

**INNGANGUR**
Vága kommuna skal hava nýggjan fíggjarleiðara, og talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, sum er leyst at søkja.

Í hesum sambandi hevur Vága kommuna gjørt eina styttri miðlalýsing um starvið, og eisini hendan leiðaraprofilin, sum er ein nærri lýsing um, hvat starvið inniber, og hvørjar væntanir Vága kommuna hevur um førleikar og royndir hjá umsøkjarum til starvið. Leiðaraprofilurin verður nýttur sum grundarlag undir viðgerðini av umsóknum, og endamálið við leiðaraprofilinum er, at væntanir hjá Vága kommunu og umsøkjarum hóska so væl saman sum til ber. Harumframt leggur Vága kommuna dent á, at umsøkjarar og kommunan hava felags fatan um starvið, soleiðis at setanin kemur at eydnast.

Fyri at geva umsøkjarum so gott grundarlag sum til ber, hevur kommunan eisini gjørt eina yvirskipaða lýsing um Vága kommunu.

**UM VÁGA KOMMUNU**
Vága kommuna fevnir um Miðvág, Sandavág og Vatnsoyrar, og tað búgva 2200 borgarar í kommununi. Býráðið í Vága kommunu hevur sett eina kós næstu 10 árini, við eini visjón um, at Vága kommuna skal vera framfýsin og fevnandi, har býráð, fyrisiting, borgarar, vinnulív og uttanhýsis áhugabólkar vita hvat kommunan stendur fyri. Visjónin lýsir eina kommunu, sum við støðufesti í staðbundnum jørðildi hevur sett sær fyri at menna kommununa til tey krøv, ið vaksandi ættarliðið setur til trivnað og umstøður. Yvirskipaðu málini fyri kommununa eru:

***Ein kommuna har øll vilja búgva***
- Býarmenning skal á dagsskránna sum liður í einum burðardyggum framburði
- Kommunan skal draga borgarar at sær og leggja upp til ein sunnan vøkstur komandi árini

***Ein virkin og skapandi kommuna***
- Vit skulu virka fyri nýskapandi kørmum, vinnuni, mentanini og ferðavinnuni at frama
- Vit skulu draga at okkum fjølbroyttar vinnufyritøkur, mentan og ferðafólk

***Í fremstu røð innan tænastur og umstøður til borgarar***
- Skulu stremba eftir at vera í fremstu røð innan tænastur til allar borgarar
- Skulu menna kommununa við fjøltáttaðum bústaðarmøguleikum og frítíðartilboðum

Atlit til grøna og burðardygga menning er meginreglan í øllum ætlanum og átøkum sum Vága kommuna stingur út í kortið komandi árini.

Býráðið í Vága kommunu, sum hevur 11 býráðslimir, er ovasti myndugleiki í kommununi. Politiska arbeiðið er skipað gjøgnum 4 fastar nevndir. Hesar eru fíggjarnevndin, Tekniska nevnd, Mentanar- og trivnaðarnevnd og Vinnu- og havnanevnd. Í umsitingini hjá Vága kommunu eru 10 starvsfólk, og samanlagt starvast umleið 160 starvsfólk hjá Vága kommunu og stovnum sum kommunan varðar av. Bygnaðurin í kommununi er samansettur av fíggjardeild, teknisku deild og mentanar- og trivnaðarøki.

**STARVIÐ SUM FÍGGJARLEIÐARI**
Fíggjarleiðarin hevur ábyrgdina av fíggjardeildini, sum inniber at bókhald, fíggjarviðurskifti og lønarviðurskifti verða røkt soleiðis, at at tað til eina og hvørja tíð er ein greið lýsing tøk av fíggjarstøðuni hjá kommununi. Harumframt hevur fíggjarleiðarin ábyrgdina av journaliseringini og móttøkuni hjá Vága kommunu.

Í løtuni starvast tvey starvsfólk á deildini og fíggjarleiðarin hevur fakligu- og leiðsluligu ábyrgdina av deildini. Umframt at skipa dagliga arbeiðið, og at tryggja at mannagongdir verða fylgdar, skalt tú sum leiðari gera greiningar, hagtøl og tilfar til politikarar í neyvum samstarvi við kommunustjóran og hinar leiðararnar í umsitingini.

**Týdningarmiklastu uppgávurnar hjá fíggjarleiðaranum eru at:**

- tryggja, at fíggjardeildin kann veita politisku skipanini professionella og fakliga ráðgeving á hægsta stigi
- vera skrivari hjá fíggjarnevndini
- standa saman við leiðsluni og tryggja, at borgarstjórin fær best møguliga tænastu, ráðgeving og kunning
- tryggja, at Vága kommuna hevur fullgóða fíggjarstýring og sunnan rakstur
- hava ábyrgdina av øllum lønarviðurskiftum hjá kommununi
- hava ábyrgdina av KT-skipanum, og tryggja at hesar lúka galdandi lógarkrøv, m.a. í sambandi við KT-trygd og persónsupplýsingar
- tryggja, at allar deildir og stovnar hava eitt fullgott fíggjaryvirlit til eina og hvørja tíð
- leggja fíggjarætlanir við neyðugum greiningum, og viðgera hesar saman við stovnsleiðslum og viðkomandi pørtum
- hava eftirlit við fíggjarligum viðurskiftum hjá stovnum og rakstrarøkjum hjá kommununi
- gera roknskapir og ábyrgdina av roknskaparreglugerð o.ø. í hesum sambandi
- gera hagtøl og greiningar innan fíggjarliga økið

**FØRLEIKAKRØV TIL FÍGGJARLEIÐARAN**
Umsøkjarar til starvið verða mettir eftir fakligum, leiðsluligum og persónligum førleikum.

Fakligir førleikar
- Viðkomandi hægri útbúgving innan roknskap, bókhald og fíggjarstýring
- Viðkomandi leiðsluroyndir og leiðsluvitan
- Dugir fíggjarliga handverkið innan kommunala og/ella almenna geiran
- Kunnleika til fyrisiting og fyrisitingarliga handverkið
- Royndir at arbeiða í einum politiskum umhvørvi
- Góð fíggjarlig og analytisk evni
- Gott skil fyri KT og ert sinnað/ur at taka við nýggjari vitan innan KT
- Hollar royndir í at arbeiða við Navision og journalskipan
- Dugir væl at samskifta og málbera teg á føroyskum í skrift og talu

Leiðslu førleikar
Ynskiligt er, at leiðarin hevur flest allar av hesum eginleikum. Væntað verður at tú:
- ert ein sterkur og loyalur leiðari við góðum evnum at leiða
- dugir at leiða saman við kommunustjóranum og borgarstjóranum
- hevur strategiskt og fíggjarligt skilvísi
- dugir at ráðgeva fíggjarliga skynsamt í mun til íløgur og rakstur
- hevur áhuga í, og sær týdningin av, at halda tíðarfreistir og evstumørk
- ert ein góður ráðgevi hjá politikarum og leiðslu
- ert treyst/ur og letur teg ikki lættliga taka av fótum
- ert ein orkufullur leiðari við góðum ”drive”

Persónligir førleikar
Fíggjarleiðarin hevur í yrkinum nógv samskifti og samstarv við onnur, og tí eru persónligu eginleikarnir týdningarmiklir. Væntað verður, at tú:
- hevur góðar menniskjaligar eginleikar, og trívist saman við øðrum
- hevur góð samstarvsevni og vísir øðrum álit og virðing
- hevur góð evni at samskifta við starvsfólk, politikarar og aðrar lyklapersónar
- hevur framskygni, virkisfýsni og at eldhugi eyðkennir teg sum persón
- ert sterk/ur og hevur ró og yvirlit, eisini tá ið støðan gerst torfør, ella tá ið arbeitt verður undir trýsti
- ert ein persónur, sum onnur kenna seg trygga/n við at tosa við, og hava virðing fyri

**LØN OG SETAN**
Miðað verður eftir at starvið kann verða sett frá 15. august 2024, ella eftir nærri avtalu. Starvið verður lønt í 36. lønarflokki hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera eitt tænastumannastarv. Harumframt verða 15% goldin í eftirlønargjaldi. Starvið kann eisini verða lønt sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

**UMSÓKN OG UPPLÝSINGAR**
Umsóknir við prógvum, c.v. og øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast við telduposti til: jhe@vaga.fo.

**Umsóknir skulu verða Vága kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 29. mai 2024.**

Áhugaðir umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu seta seg í samband við Jóhan Hendrik Ellefsen, kommunustjóra á telefon 794408, ella við telduposti: jhe@vaga.fo. Víst verður eisini til heimasíðuna hjá Vága kommunu: www.vaga.fo.

**SETANARTILGONGDIN**
Tá umsóknarfreistin er farin, verður ein setanarbólkur settur at meta um umsøkjarar, og at gera tilmæli um setanina. Setanartilgongdin verður skipað á tann hátt, at setanarbólkurin velur nakrar umsøkjarar til fyrstu samrøðu. Eftir fyrstu samrøðu verður mett um, hvørjir umsøkjarar skulu koma til aðru samrøðu. Teir umsøkjarar, ið koma til aðru samrøðu, skulu áðrenn samrøðuna taka eina test, har dentur verður lagdur á leiðslu. Úrslitini frá testini verða gjøgnumgingin saman við umsøkjaranum, áðrenn tey verða løgd fram fyri setanarbólkinum.

Tá setanarbólkurin er liðugur við sítt tilmæli, verður tilmæli viðgjørt av Fíggjarnevndini í Vága kommunu, sum tekur avgerð um setanina.

**TÁ STARVIÐ ER SETT**
Eftir fimm mánaðar og eitt ár í starvi verða uppfylgjandi samrøður, sum fyrst og fremst eru ætlaðar at gera støðuna upp í mun til væntanir hjá báðum pørtum.